# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Johan Samuelsen seksti

Leygardagin 11. februar verður Johan Samuelsen, fyrrverandi lærari, 60 ár

Johan Samuelsen er havnarmaður, hann tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1969 og hevur verið lærari í Kommunuskúlanum síðani, til hann í september í fjør legði frá sær. Hann er giftur við Jóhonnu, f. Clementsen úr Elduvík, og saman eiga tey bæði trý børn: Tvíburðarnar Biritu og Berg og Magnus.

Birita er sjúkrasystir á Landssjúkrahúsinum, er gift við Jógvan Lassen úr Klaksvík, og tey eiga børnini Hanus og Jóhonnu.

Bergur er lærari í Tórshavnar Kommunuskúla. Hann býr saman við Jacobu Lervig og eiga tey døturnar Helgu, Ingibjørg og Elsu.

Magnus er cand. mag. í samfelagsfrøðði og søgu. Hann starvast á skúlanum á Kambsdali og á Oyrarbakka. hann er giftur við Jenny Petersen og eiga tey synirnar Johan og Martin Emil.

Sum lærari hevur Johan Samuelsen undirvíst í søgu og fleiri mállærugreinum, serliga føroyskum, enskum



og týskum, sum er hansara favoritmál. Í sínum arbeiði hevur hann lagt stóran dent á, at næmingarnir skulu vera fakliga væl fyri. Johan undirvísti eisini á Føroya Handilsskúla frá 1970-80.

Í 1979 bleiv Johan sjúkur og misti likamliga førleikan, soleiðis at hann kom at sita í koyristóli, men hetta hevur avgjørt ikki skert hansara lívsvilja, og hann hevur víst at tað ber væl til at liva og arbeiða á líka fót við øll onnur.

Hann var limur í skúlaráðnum í Havn frá 1989, til skúlaráðini vórðu niðurløgd fyri nøkrum árum síðan.

Johan hevur altíð verið ítróttarmaður, og var hann ein framúr góður flogbóltsspælari. Síðan hann hann misti likamliga førleikan, hevur hann svomið nógv og verið virkin innan Ítróttarsambandið fyri Brekað (ÍSB) og Meginfelag teirra Brekaðu (MBF). Hann hevur eisini luttikið í altjóða svimjikappingum uttanlands.

Johan er ein áhugaverdur persónur. Hann hevur stóran áhuga í samfelagsviðurskiftum og er tí søguliga. Hann hevur eitt gott minni og kann siga frá nógvum áhugaverdum og stuttligum hendingum, serliga um Havnini og Hornabø, har hann vaks upp.

Johan og Jóhanna eru burturstødd føðingardagin.

---

## Andlát og jarðarferðir

**Svenning Holm Lindenskov, Nólsoy**, fer til gravar leygardagin kl. 13 úr Nólsoyar Kirkju. Í hesum sambandi siglir Ritan av Havnini kl. 12 leygardagin. Túrurin kl. 15 av Havnini verður broyttur til kl. 16.

**Ansa Højgaard í Søldarfirði** andaðist í heiminum hósdagin 9. februar, 65 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Elim í Søldarfirði sunnudagin 12. februar kl. 13. Tey ið vilja minnast Ansu, kunnu lata Elim í Søldarfirði eina gávu.

**Ella Arge í Hornabø, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikumorgunin 8. februar, 90 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 11. februar kl. 14.

---

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at góða kona, mamma, vermamma og omma

**Ansa Højgaard**
Søldafjørður

andaðist í heiminum 9. februar, 65 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Elim í Søldafirði sunnudagin 12. februar kl. 13.00.

**Lenni, Hans Jacob, Súnfríður og Helmund v/ familjum**

---

## Asta og Luddi Abrahamsen gullbrúdleyp

Leygardagin 11. februar eru hálvt hundrað ár síðani, at Asta og Ludvík Abrahamsen í Klaksvík góvu hvørjum øðrum sítt ja í Oyndarfjarðar kirkju. Tey eru bæði ættað úr Oyndarfirði, og tey eru bæði fødd Abrahamsen. Pápi Astu og gullbrúðgómurin vóru systkinabørn.

Asta og Luddi búsettust á Selheyggi í Klaksvík. Tey giftust inn hjá beiggja hansara, Jákupi, sum var ógiftur, og síðani bygdu tey sjálvi longri uppi á Selheyggi. Nú kallast adressan í Brekkuskákinum, og har búgva tey framvegis.

Asta er fødd 7. februar í 1934. Sambært fínu bókini hjá Freydis Poulsen um Oyndarfjørð er slektin hjá henni úr húsunum hjá Abrahami á Bakka, sum var abbi hennara. Sonur hansara, Hans Jacob, var pápi Astu. Kona hansara var Jana fødd Eldevig og ættað úr Elduvík. Tey bygdu niðarlaga í Tartabø, og tey fingu ellivu børn: Elmar (1932) búði í Keypmannahavn. Hann doyði í 2001. Asta (1934), Jóhannes (1935) á Argjum, Jastrid (1936) í Oyndarfirði, Simon (1938) á Bornholm, Signy (1941) í Oyndarfirði, Regin (1943) í Nakskov, Edmunda (1945) í Leirvík, Ella Magnina (1946) í



Klaksvík og Súni (1960) í Oyndarfirði.

Ludvík er føddur 26. november 1926. Pápi hansara var Hans Jacob Abrahamsen. Mamman var Anna fødd Jacobsen og ættað úr Uttarstovu í Hattarvík. Í Oyndarfirði varð hon nevnd Fugloyar Anna. Tey bygdu inni í Tarti, og tey fingu fimm børn: Annia (1915) í Klaksvík. Hon doyði í 1992. Svanhilda (1917) doyði í 1929, Jákup (1921) í Klaksvík doyði í 1988, Julianna (1922) í Oyndarfirði og Ludvík (1926).

Asta tænti hjá mammabeiggjanum, Fríðriki Bláhamar í Vestmanna, í tvey ár, og eitt skifti var hon hjá mammubeiggjanum Jákupi Eldevig í Elduvík. Asta hevur altíð verið sera arbeiðssom. Tá ið børnini vóru smá, megnaði hon bæði at vera væl um tey og eisini at arbeiða úti. Hon var á hermetikkvirkinum ella bollafabrikkini hjá Kjølbro og á sjóklædnavirkinum hjá Holgari Poulsen, og í meiri enn tjúgu ár var hon heimahjálp.

Eitt skifti fyrst í seksti árunum var Luddi vaktarmaður á ísvirkinum hjá Kjølbro á Stongunum, men nógv tey flestu av arbeiðsárunum var hann á sjónum. Hann var við fiskiskipi, og seinni var hann í mong ár á brúnni á farmaskipum. Í 1952 tók hann seturskiparaprógv, og í 1960 tók hann longdina.

Luddi var í fleiri ár við Jógvani Páll Fjalsbak. Fyrst var tað við Polo, sum tá sigldi við timbri, sementi og øðrum farmi fyri Kjølbro, og síðani við Elsu F, sum Jógvan Páll sjálvur átti. Seinni var Luddi við skipum hjá Kimbli - Kalsevni og Grími Kamban - og seinni aftur sigldi hann við donskum farmaskipum. Eftir at hann orsaka av aldri var farin í land, egndi hann og róði út.

Asta og Luddi eiga fimm børn: Harry (1956) býr í Streymnesi, Heðin (1957) býr í Kollafirði, Arthur (1958) býr á Norðoyri, Arnhild (1960) býr í Klaksvík, og Jana (1968) býr í Hoyvík. Asta og Luddi eiga 13 barnabørn og eitt langommu- og langabbabarn.

Asta og Luddi eru nógv um yngru ættarliðini, sum tey hava stóra umsorgan fyri. T.d. eru tey altíð klár at ansa barnabørnunum, og Asta bindur teimum mangt plaggið.

Leygardagin 11. februar, tá ið 50 ár eru liðin síðani tey bæði giftust, hátíðarheldur øll familjan umborð á Norrönu.

**Børnini**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, og hjálptu okkum, tá ið kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Martin Thomsen**
prentari

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Missiónshúsið við Landavegin.
Hjartaliga takka vit øllum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ragna**
**Birita, Petra og Hildigunn**